## Krzysztof vann stórt

Aarhus Fremad hevur havt fíggjarligar trupulleikar at dragast við, men leiðarar og spælarar eru farnir niður í løn, og tað hevur eftir øllum at døma bjargað felagnum. Á vøllinum gekk heilt væl um vikuskiftið. Aarhus Fremad spældi á heimavølli ímóti Hobro, og liðið hjá Krzysztof Popczynski vann ikki minni enn 6-1. Hobro legði seg annars á odda í dystinum, men í seinna hálvleiki rann Fremad teir um koll.



## Bymar pyntaði um úrslitið

Fyrrverandi KÍ og B68 framherjin Jacob Bymar skorar regluliga mál fyri danska 2. deildarliðið Varde, og Bymar fekk ein eitt mál um vikuskiftið. Tað gekk bara ikki nakað serliga væl hjá Varde, sum tapti 4-1 ímóti Blokhus FC. Jacob Bymar skoraði til 2-1 beint fyri hálvleikssteðgin, men í seinna hálvleiki skoraðu teir úr Blokhus tvey mál afturat.




Rógvi Jacobsen sendi tvær ferðir bóltin í KÍ-meskarnar, og meðan fuglfirðingar kundu fegnast, mátti KÍ ásanna, at talan helst verður um leygardagsfótbólt í 2010

Mynd: Álvur Haraldsen

ÍF-KÍ 5-0 (3-0):

# Rógvi brast bjargingarbátin

**KÍ var í tungum sjógvi, og fyri kortum setti felagið bjargingarbátin út. Men Rógvi Jacobsen og ÍF settu eitt stórt hol á hendan leygardagin, so nú er einasta vónin hjá klaksvíkingum at svimja skjótt, um liðið ikki skal søkka og gera árið søguligt**

ÍF

KÍ




Eirikur í Jákupsstovu

Longu áðrenn kappingin byrjaði tosaðu fleiri um at KÍ-skútan var ótøtt. Ætlanin var at ungir leikarar skuldu vaksa til at manna farið virðiliga, eftir at Rógvi Jacobsen og aðrir ikki longur vóru partar av felagnum. Tá 13 umfør vóru spæld eydnaðist endiliga KÍ at vinna ein dyst. Eftir hetta gekk rímiligt til summarsteðgin og ungu leikararnir sóu út til at hava fóta sær.

Stigini teir vunnu vóru tó ikki so nógv, og reiðararnir á KÍ gróvu niður í mappurnar og fingu fleiri leikarar, sum á pappírinum skuldu styrkt hópin.

Heldur ikki hetta gav nóg góð úrslit, og so varð Petur Mohr, sum bjargaði KÍ í fjør, settur sum venjari.

Leygardagin skuldi KÍ so vísa, at teir eiga at vera í bestu deildini, men tá klaksvíkingurin, Rógvi Jacobsen, gjørdi tvey mál, var hol á bjargingarbátinum hjá KÍ 1904 og tá var laga manni hjá restini av ÍF liðnum at koyra seinastu luftina úr KÍ.

ÍF var hinvegin ikki í so stórum trupulleikum, áðrenn dystin, men eitt tap kundi geva liðnum stórar trupulleikar, so sigurin er heilt víst kærkomin í Fuglafirði, har tey eru farin at sparka, heldur enn at spæla bólt.

### Sparka bólt

Dysturin byrjaðir rættiliga javnur. Hvørki av liðunum spældi væl. KÍ fekk fyrsta møguleikan, men eftir tað tók ÍF yvir við møguleikum.

Fuglfirðingar hava verið kendir fyri góðan fótbólt, men tað var ikki eyðkennið leygardagin. Heldur var tað at royna at vinna bóltin, fyri at koyra hann út á vengurnar, sum síðani lossaðu bóltarnar innfyri.

Hetta hevði við sær, at liðini høvdu bóltin eins nógv, men ÍF fekk nógv fleiri møguleikar. Og møguleikarnir góvu eisini sítt, tí støðan var 3-0 í hálvleikinum.

### Sorl

Tá seinni hálvleikur byrjaði, royndi KÍ at gera sítt, men longu eftir lítlari løtu fekk ÍF eitt mál afturat og tað sýntist óneyðugt at spæla restina av dystinum.

KÍ kundi valt at satsa, við at skifta millum aðrar Kristoff Jacobsen á vøllin, men soleiðis bleiv ikki. Petur Mohr nýtti nevniliga sínar skiftingar til at skifta Rudolf Eliasen, Ara Samson og Oddmar á Lakjuni, sum allir eru verjukendir leikarar, á vøllin.

Restin av dystinum var merktur av hesum. KÍ fekk onkran møguleika, men tað var ÍF, sum átti teir stóru. Og fuglfirðingar fingu eisini eitt mál afturat, og tað var tættari við 6-0 enn 5-1.

### KÍ niður

Sum er, sær út til, at møguleikin fyri at KÍ fer niður, er eins stórur, sum at HB verður meistari, so tað er í botninum, at 2009 í veruleikanum verður søguligt. Í Fuglafirði anda tey nú lætt, og einfaldi spælistýlurin hjá liðnum hóskar væl til leikararnar, sum venja í Fuglafirði.

## Málini

**1-0:** Andy Olsen leggur bólt inn í brotsteigin, har Rógvi Jacobsen stormar inn og kann ótarnaður stúta bóltin í málið.
**2-0:** Andy Olsen spælir bóltin allan vegin úr vinstru í høgru, haðani Alexandur Jovevic sendir bóltin innfyri. Rógvi Jacobsen kemur fram um verjuleikaran og prikar bóltin í málið.
**3-0:** Frank Poulsen leggur bleytan bólt høgt innfyri, har Øssur Dalbúð verður hægstur og fær bóltin í málið.
**4-0:** Langt innkast úr vinstru síðu, sum Rógvi Jacobsen leingir til Nenad Saric, sum sleppur at venda sær í málteiginum og smekkar bóltin í málið.
**5-0:** Dánjal á Lakjuni leggur bóltin høgt innfyri. Andy Olsen heilfluktar bóltin í málið.

## Trúgva framvegis

Petur Mohr, venjari hjá KÍ, staðfestir, at í Klaksvík trúgva tey framvegis uppá eina bjarging.

- Eg hevði neyvan staðið her og svara upp á spurningar, um eg ikki trúði uppá tað, sigur Petur Mohr, hóast liðið varð sent av vøllinum við einum ógvusligum tapi.

Sum dysturin leið, gjørdi KÍ nógvar verjukendar útskiftingar.

- Vit byrjaðu væl, men so byrjaði at skrædna og so bleiv tað til ein spurning at avmarka tapið, sigur Petur Mohr, sum eisini staðfestir, at nú hyggja tey frameftir og framvegis trúgva upp á eina bjarging.

-eij

## Glaður Løkin

Abraham Løkin, venjari hjá ÍF, var sera fegin eftir dystin.

- Hetta var ein veldig gleði fyri okkum. Vit høvdu veruliga brúk fyri hesum stigunum, sigur Abraham Løkin.

Hann vísir tó á, at liðið enn ikki er tryggjað.

- Vit eru ikki tryggjaðir enn, men vit eru nærri við at vera tryggjaðir, sigur hann.

Somuleiðis greiðir hann frá, at hann ikki er vísur í at tað gongur hjá ÍF, men at hann er vísur í, at tað skal ganga.

-eij

## Passaði ikki til KÍ

Rógvi Jacobsen varð skiftur út, tá góður tími var spældur av dystinum. Tá útskiftingin kom sendi hann kossar til áskoðararnar og klaksvíkingurin hevur ikki ilt av, at tað kanska eru hansara mál, sum senda barndóms felagið niður í 1. deild.

- Tað er kanska ein snedig kensla, men eg fekk at vita, at eg ikki passi til spælistýlin hjá KÍ. Tað er ergiligt, at mann má finna sær nýtt felag, og eg havi havt tað tungt, men tað er ein góð kensla at sleppa at spæla aftur, sigur Rógvi Jacobsen.

Rógvi Jacobsen er framvegis ikki vísur í, at ÍF eru bjargaðir.

- Vit hava ein týdningarmiklan dyst ímóti 07 Vestur, tí tapa vit tann dystin, so kunnu vit enda í somu støðu, sum vit vóru áðrenn hendan dystin, sigur Rógvi Jacobsen.

-eij